Áðrenn Monza:

# 370 km/t á heimsins skjótastu formel 1 breyt

**Monza formel 1 breytin er seinasta veruliga háferðsbreytin á formel 1 skránni. Breytin setur nøkur heilt serlig krøv til bilarnar, og ikki minst motorarnar. Tí er ringt at gita, hvør fer at blanda seg í stríðið um sigurin**




FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eingin ivi er um, at McLaren-Mercedes og Renault eru bestu boðini, um hvør vinnur formel 1 koyringina í Italia. Serliga hevur McLaren bilurin verið sera sannførandi seinastu tíðina. Renault hevur væntandi stórar aerodynamiskar broytingar klárar til koyringina í Brasil, men hetta er ikki fyrr enn um tríggjar vikur, so inntil tá átti McLaren at verið besta boð.

Í løtuni er finski McLaren koyrarin Kimi Räikkönen einasti maður, ið kann avbjóða spanska Renault koyraranum Fernando Alonso í stríðnum um heimsmeistaraheitið. Räikkönen hevur 71 stig móti teimum 95 hjá Alonso. 5 koyringar eru eftir, sigrar í øllum fimm gevur 50 stig, men sjálvt hetta er ikki nóg mikið fyri Räikkönen, uttan so at Alonso endar aftarliga í nøkrum av koyringunum. Hetta hevur tó ikki fingið liðfelagan hjá Räikkönen kolumbiumannin Juan Pablo Montoya at gera honum nakrar tænastur. Montoya sigur, at hann koyrir fyri at taka sigurin í hvørjari koyring. Tað kann sostatt enda við, at tað verður Montoya, ið forðar McLaren í at fáa heimsmeistaraheitið fyri koyrarar.

## Speedarin í botn

Monza er ein heilt serlig breyt, sum ikki líkist nakrari aðrari núverandi formel 1 breyt. Speedarin á formel 1 bilunum er trýstur heilt í botn á 70% av Monza breytini, og hetta setur stór krøv til motorarnar.

Í ár er fyrsta ár at koyrast skal tvær koyringar við hvørjum motori, og harða viðferðin av motorum á Monza kann geva teimum bilunum, ið hava motorar, sum longu eru brúktir einaferð, trupulleikar. Hinir bilarnir eru ikki nógv betur fyri, tí teir koma til koyringina í Belgia um eina viku við einum sera slitnum motori.

Men Monza setur eisini høg krøv til bremsurnar. Tá bilarnir koyra skjótast er ferðin umleið 370 km/t., hetta er stutt áðrenn eitt sving, har koyrast skal umleið 80 km/t., her skal bremsast harðliga. Hetta er eisini kropsliga hart fyri koyrararnar.

## Broyttur aerodynamikkur

Ferrari, Toyota og BAR-Honda høvdu í royndarkoyringunum í seinastu viku gjørt nakrar aerodynamiskar broytingar fyri at gera bilin betur egnaðan til háferðsbreytina. Hvat úrslitið verður av hesum, verður spennandi at síggja. Hesi trý lið kunnu eisini øll blanda seg í stríðið um sigurin í sunnudagin. Toyota hevur ein av bestu- og tann mest álítandi motorin í formel 1 í ár. Hetta kann gerast avgerandi á Monza. Jarno Trulli hevur ferð eftir ferð megnað at blanda seg í oddastríðið.

BAR-Honda koyrarin Jenson Button byrjaði av 13 plássi fyri tveimum vikum síðan í Turkalandi, og endaði á 5 pláss, har hann legði trýst á Giancarlo Fisichella í Renault. Var Button byrjaður frammaliga hevði hann kunna verið við í oddastríðnum. Við teimum umfatandi aerodynamiskum broytingunum og einum kraftmiklum Honda motori, kann Jenson Button væl gerast stóra jaligа upplivingin hetta vikuskiftið. Stóri trupulleikin er, at Honda als ikki hava havt ein serliga álítandi motor í ár.

## Tifosi krevur Ferrari sigur

Italska fomel 1 koyringin á Monza er heimavøllur hjá Ferrari, og kravið frá áskoðarunum er ein Ferrari sigur. Seinastu nógvu árini hevur Monza verið ein veitsla har Ferrari longu vóru meistarar, og komu heim at takka sínum trúfasta italska viðhaldsfólki, teimum sonevndu Tifosi. Eisini í fjør vann Rubens Barrichello fyri Ferrari, men hetta var í einum formel 1 ári, har Ferrari vóru heilt framúrskarandi. Árið í ár er slakasta ár hjá Ferrari í nógv ár, og teirra nógvu Tifosi, hava ikki havt nógv at gleðast um, men vinna Ferrari á heimavølli, so er ikki heilt galið alíkavæl.

Sjeyfaldi heimsmeistarin og formel1 koyrarin Michael Schumacher letur væl at bilinum. Schumacher segði aftan á royndarkoyringina at bilurin royndist væl.

## Jordan kastaðu lut

Jordan Toyota, ið vanliga liggja og kappast við Minardi um næst aftarstu plássini, hava ein nýggjan og betri bil við, men tíanverri hevur liðið bara ein av slagnum Tí hava tey kastað lut, um hvør av koyrarunum skal fáa nýggja bilin, úrslitið var, at Tiago Monteiro fekk nýggja bilin, meðan Narain Karthikeyan noyðist í gomlu útgávuna av bilinum.

## FAKTA

**Um italsku koyringina á Monza**

**Umferðir:** 53
Breytarlongd: 5,793 km
Skjótast umferð: Rubens Barrichello (Ferrari) 1 minutt 21,046 sekund
Longdin á koyringini: 306,720 km
Núverandi koyrarar sum hava vunnið á Monza:
David Coulthard 1995 (McLaren-Mercedes)
Michael Schumacher 1996, 1998, 2000, 2003 (Ferrari), Juan Pablo Montoya 2001 (Williams-BMW),
Rubens Barrichello 2002, 2004 (Ferrari).

Keldur: www.f1.com og www.forix.com

## HM fyri koyararar

| | |
|---|---|
| 1 Fernando Alonso | 95 |
| 2 Kimi Räikkönen | 71 |
| 3 Michael Schumacher | 55 |
| 4 Juan-Pablo Montoya | 40 |
| 5 Jarno Trulli | 39 |
| 6 Giancarlo Fisichella | 35 |
| 7 Ralf Schumacher | 32 |
| 8 Rubens Barrichello | 31 |
| 9 Nick Heidfeld | 28 |
| 10 Mark Webber | 24 |

## HM fyri lið

| | |
|---|---|
| Renault F1 | 130 |
| McLaren-Mercedes | 121 |
| Scuderia Ferrari | 86 |
| Toyota Racing | 71 |
| BMW WilliamsF1 | 52 |
| Red Bull Cosworth | 27 |
| BAR Honda | 24 |
| Sauber Petronas | 14 |
| Jordan Toyota | 11 |
| Minardi Cosworth | 7 |